Eldar Sætre, forstjóri í Statoil. Mynd: Jógvan H. Gardar

# Statoil-partabrævið betri umtókt aftur

**Jógvan Hugo Gardar**

10.10.2015 - 09:52

Oljan.fo
Vit skulu tvey ár aftur í tíð fyri at finna ein so jaligan tóna mótvegis Statoil millum greinarar, sum í løtuni. Tað er helst rætt at siga at Statoil-partabrævið hevur verið millum tey parrtabrøvini sum greinarar hava hildið at íleggjarar eiga at halda seg burtur frá. Í juni søgdu 44 prosent av greinarunum at best var at selja um ein átti Statoil-partabrøv, meðan 20 prosent hildu at en átti at umhugsa at keypa.

Sambært nýggjum metingum sum Bloomberg hevur almannakunngjørt, so siga nú 41 prosent av greinarunum at ein eigur at keypa Statoil-partabrøv nú, og 29 prosent siga at best er at selja.

Sambært Bloomberg er orsøkin til at greinararnir eru blivnir meir jaligir ikki oljuprísurin, men tann lantíðar spariætlanin sum Statoil setti í verk fyri góðum ári síðani. Hendan ætlanin hevur víst seg at geva góð úrslit í eini vinnu sum stríðist við ov høgar kostnaðir nú oljuprísurin er lækkaður.

Tað sæst eisini aftur á keypsskálanum í Oslo, at Statoil hevur meir undanvind nú, tí partabrævið, sum fyri tveimum vikum síðani bert kostaði 120 norskar krónur, so er prísurin hækkaður munandi. Hósdagin og í gjár bleiv partabrævið selt fyri 145 norskar krónur fyri hvørt partabrævið. Tá keypsskálin stongdi í gjár var seinasta sølan fyri 142,20 norskar krónur.